

Tórði Midjord og starvsfelagi hansara Helgi Magnussen brúka nógva tíð til at leita eftir teimum, sum eiga allar funnu lutirnar





MYNDIR: JENS KRISTIAN VANG

# NOYÐAST AT BRENNA GÓÐ KLÆÐIR

TAÐ ER EINKI MARK FYRI, HVAT **POLITIÐ** FÆR INN AV FUNNUM LUTUM. NAKAÐ VERÐUR SELT Á **UPPBOÐSSØLU**, MEN EIN STÓRUR PARTUR FER **BURTUR**. KOSTNAÐARMIKIL GÓÐ **KLÆÐIR** HEVUR POLITIIÐ IKKI LOYVI TIL AT GEVA ØÐRUM

BURTURMIST
Randi Jacobsen
randi@sosialurin.fo

Javnan koma fólk í ymiskum ørindum inn í móttøkuna á polisttøðini í Havn, og av og á kemur eisini onkur at spyrja eftir einum bururmistum luti ella við einum luti, sum viðkomandi hevur funnið onkrastaðni. Oftari koma lutir inn, enn teir fara útaftur.

Í móttøkuni stendur eitt stórt skáp fult av funnum lutum.

Politisturin Tóri Midjord vísir fram, hvat liggur í skuffunum í hesum stóra skápinum.

Ein kassi er fullur av fartelefonum. Politiið kann í summum førum finna fam til eigaran, men verri enn so altíð. Ofta koma fólk inn at spyrja eftir eini burturmistari fartelefon, men tey fáa hana bara, um tey duga pinkoduna.

– Ein maður, sum kom at spyrja eftir síni fartelefon, sum var her, var ovurfegin um at fáa telefonina aftur, tí tað lógu so nógvar mndir inni á henni, og hesar myndir vildi hann ikki, at onnur fólk skuldu síggja, sigur Tórði Midjord.

Hann og starvsfelagin Helgi Magnussen hava ábyrgdina av funnu lutunum.

Heilt nógvar telefonir koma í land av Norrönu.

## Nógvir lyklar

Politiið goymir bara telefonirnar í tríggjar mánaðir. So verða tær fyribeindar.



Ein annar kassi er dýrandi fullur av lyklum, stórum og smáum. Har liggja fleiri lyklasett. Eru system-lyklar ímillum, spyr politiið seg fyri hjá Ruko-fyritøkuni, sum kann upplýsa, hvar lykilin hoyrir til. Heilt nógvir billyklar eru í skuffuni, og Tórði Midjord heldur tað vera løgið, at ikki fleiri bileigarar spyrja seg fyri hjá politinum, tá ið teir hava mist billyklin burtur. Annars er tað rættiliga vanligt, at fólk koma inn og spyrja eftir burturmistum lyklum.

Brillurnar eru eisini nógvar, og tað er ógjørligt at vita, hvør eigur tær. Men ein stórur partur av brillunum fer út aftur, tí fólk, sum brúka brillur, kunnu illa vera tær fyriuttan, og tí spyrja fólk seg fyri hjá politinum eftir brillunum.

Gull- og silvursmúkkur eru nakrar, og so er ein stórur kassi við pungum og smáum taskum. Tá ið einki navn er í, liggja pungarnir og rtaskurnar bara og bíða, til onkur kanska spyr eftir teimum.

## Krusifiks á uppboðssølu

– Eina ferð kom inn eitt krusifiks, sum heilt vist varð stolið úr onkrari kirkju ella onkrum missiónshúsi. Vit lýstu við, at tað var her, men eingin spurdi nakrantíð eftir tí. Endin var, at tað varð selt á uppboðssølu, og ein smágenta keypti tað fyri 50 krónur, sigur Tórði Midjord.

Sama var, tá ið ein snøggur virðismikil grindaknívur kom inn. Knívurin varð funnin á vestaru bryggju í Havn, beint eftir at tað hevði verið grind. Knívurin, sum var verdur fleiri túsund krónur, varð seldur á uppboðssølu fyri 1000 krónur.

Higartil eru 60 lutir komnir inn. Í fjør vóru teir 473. Okkurt um 70 prosent fara útaftur.

## Klæðir úr øllum ættum

Í kjallaranum á politistøðini er eitt rúm við størri eigaraleysum lutum.

Har standa fýra sekkir av klæðum, sum kioskin í Steinatúni í Havn hevur latið inn. Hetta eru klæðir, sum fólk hava gloymt í bussunum.

Í einum horni standa fimm sekkir við klæðum av Norrönu.

Nakrir sekkir eru fullir av klæðum, sum eru komin úr Badmintonhøllini og Gundadalshøllini. Mest eru tað góðir ítróttarskógvar og troyggjur, sum eru nógv verdar. Alt hetta hava børn og ung fólk átt, tí nummarið á skónum liggur millum 35 og 42.

Tórði Midjord harmast um, at eingin spyr eftir hesum virðismiklu klæðunum, og hann harmast iki minst um, at tá ið klæðini hava ligið eitt ár á politistøðini, verða tey koyrd á brennistøðina. Politiið hevur ikki loyvi til at geva klæðini burtur.

Á gólvinum stendur ein eldsløkkjari, sum eingin kenst við, og við síðuna av eitt ølfat. Hetta má vera stolið onkrastaðni. Tað skvaggar eitt sindur í. Føroya Bjór eigur einki í ølfatinum, og áskriftin er Carlsberg. Neyvan kemur nakar og spyr eftir tí.

## Góðar súkklur

Undir einum hálvtaki í garðinum standa og hanga súkklurnar í stórum tali. Tær innaru eru allar úr Havn. Uttast standa fýra góðar barnasúkklur, sum í ett ár hava staðið á politistøðini í Klaksvík. Nú eru tær komnar til Havnar, og tær verða seldar á komandi uppboðssølu hjá politinum.

Tann uppboðssølan plagar at vera nakað heilt serligt. Nógv fólk møtir, og summi eru heppin og ogna sær eitt nú eina súkklu fyri lítlan pening.